ÚT AT KOYRA

Renault ársins vørubilur

Renault Master var› valdur til ársins vørubil í Danmark fyri 2001, í har›ari kapping vi› Mercedes-Benz Sprinter, Ford Transit og Hyundai Trajet.

Kelda: Motor Magasinet

1300 BMW politibilar



Italska politi›, sum fyri ta› mesta koyrir í italskum bilum, hevur bílagt 1300 politibilar av BMW-300 rø›ini, i› skulu leverast eftir trimum árum.

Kelda: BMW Magasin

Ársins bilur í Europa

Alfa Romeo 147 bleiv av eini altjó›a dómsnevnd kosin til ársins bil í Europa fyri 2001. Bilurin kemur til Danmarkar fyrst í komandi ári.

Kelda: Motor Magasinet

Saab SVC - svenskarar kollvelta bilmotorin

BILAR
Magnus Gunnarsson

Ta› ver›ur einki minni enn ein kollvelting innan nútímans motorframle i›slu, tá SVC (Saab Variable Compression) verkætlanin i› Saab arbei›ir vi›, har til ber at broyta kompressiónslutfalli› me›an bilurin koyrur, ver›ur veruleiki.

Hóast ta› ver›a eini f‡ra til fimm ár til Saab Variable Copression (SVC) motorarnir ver›a klárir til framlei›slu, hevur Saab longu nú tveir royndarbilar vi› 5 syl. 1,6 litur motorum koyrandi. Ætlanin er at hesir motorar eisini skulu brúkast í flestu GM bilum framyvir

Einfalt hugskot

Hóast teir vanligu motorarnir eru nógv betra›ir seinastu 100 árini, til at ver›a ógvuliga framkomnir í dag, hava ikki nógvar grundleggjandi broytingar veri› gjørdar. Nú er so naka› kollveltandi vi› at henda á Saab bilaverksmi›juni í Svøríki, har nærlagdir verkfrø›ingar vi› einfaldum hugskotum, hava gjørt royndir vi› at broyta tann vanliga bensinmotorin so grundleggjandi, at hann fer at virka heilt annarlei›is enn higartil.

Kompressiónslutfalli› broytist

Vi› einari mekanismu, sum flytur toppstykki›, solei›is at kompressiónslutfalli› broytist undir koyring, er ta› møguligt at fáa ein 4 syl.1,6 litur motor at geva somu kraft sum ein 3.0 litur motorur vi› 6 sylindarum. Á sama hátt kann ein 1,2 litur motorur geva somu kraft sum ein 2.0 litur motorur. Heilt einfalt kann sigast um kompressiónslutfalli›, at ta› er eitt úttrykk fyri hvussu nógv bensin og luftbalandingin ver›ur samantr‡st, á›renn hon tendrar. Hetta lutfall hevur stóra ávirkan á hvussu effektivt motorurin brúkar orkuna í brennievninum.

General Motors eigur Saab

Eftir at risafyritøkan, General Motors, hevur keypt allan partapeningin í Saab, hevur lei›slan í GM avgjørt at í framtí›ini kemur Saab at hava stóra ávirkan á menningarverkætlanirnar hjá GM-konsernina. Hetta er ein sta›festing av tí førleika i› Saab hevur bygt upp sí›an teir fóru at gera sínar egnu motorar fyri gó›um 30 árum sí›an. Fyrrverandi menningarstjóran hjá Saab, Kjell A.C.Bergstrøm, er settur sum stjóri á menningardeildini fyri motorar og gearkassar hjá GM í Italia.

Saab t‡›andi leiklut

Ta› hevur ver›i nógv gitt um framtí›ina hjá Saab, men ongin ivi er um at teir koma at hava ein t‡›andi leiklut í alheims bilídna›inum undir lei›slu av GM, samstundis sum teir koma at halda fast um tær si›venjur, sum hava gjørt hesa lutfallsliga lítlu svensku bilaverksmi›juna kenda um allan heimin.

Kelda: FDM / Motor

Í n‡ggja búmerkinum hjá Saab, er Scania navni› strika›



Hesar tekningar vísa hvussu Saab Variable Compression (SVC) virkar

ÚT AT KOYRA

Grand Pajero – jeepur vi› sjálvberandi karossaríi

Grand Pajero hevur sjálvberandi karossarí og skivubremsur á øllum hjólum

Mynd: Jens K. Vang

BILAR
Magnus Gunnarsson

Ta› er ikki á hvørjum degi at jeepar skifta modell, men nú kemur tann vælumtókti jeepurin hjá Mitsubishi, Pajero, í heilt n‡ggjari Grand Pajero útgávu

Sjálvberandi karrossarí

Sum naka› heilt n‡tt er Grand Pajero nú komin vi› sjálvberandi karrossaríi, í sta›in fyri chassisrammu, sum er vanligt fyri jeepar í hesi støddini. Ta› eru fleiri fyrimunir vi› sjálvberandi karrossaríi, sum til dømis ta› at bilurin ver›ur lættari, og tryggari vi› ein samanstoyt, tí at hann kroystist saman á teimum røttu stø›unum, og harvi› ver›a tey sum sita í bilinum betur vard.

Skivubremsur á øllum hjólunum

Hóast hetta er ein heilt n‡ggjur bilur, sæst á modellinum at talan er um ein Pajero. Linjurnar eru naka› rundari, og bilurin sær kraftigari út. Kanningar vísa at flestu jeepar sjáldan koyra uttanfyri vanligan koyriveg. Hetta hevur ført til at bilverksmi›jurnar gera jeeparnar so gó›ar sum persónbilar at koyra, uttan at ta› gongur út yvir off-road eginleikarnar. Pajero hevur ikki fastar akslar, men hjólini eru óbundin av hvørjum ø›rum, eins og hann hevur skivubremsur á øllum hjólunum.

Invecs ll automatgear

Ein heilt n‡ggjur dieselmotorur er vi› í skránni fyri n‡ggja Grand Pajero. Talan er um ein 4 syl. 3,2 litur turbo diesel vi› intercoolara, common rail innspræning og 165 hk, sum hóskar sera væl til bilin, vi› ta› at hann hevur gó›a trekkkraft, og klárar seg væl í brøttum lendi. Sum naka› n‡tt fæst Grand Pajero vi› n‡ggja 5-trins gearkassanum hjá Mitsubishi, Invecs ll, har til ber at velja ímillum manuelt og automatgear. Invecs ll skiftir gear so lætt at ta› næstan ikki merkist, og lagar seg elektroniskt eftir koyringini hjá bilføraranum.

Opi› hús leygardagin

Grand Pajero fæst í tveimum støddum, vi› ávikavist 3 og 5 hur›um. Felags fyri bæ›i modellini er, at setrini og innrættingin er í toppklassa. Sum standard útger› er millum anna› sentrallás, el-rútar, SS-ll Super Select 4 WD skipan, multi-f u n k t i ó n s - d i s p l a y, differentiali sperra og RDS radio vi› fløguspælara.

Í sambandi vi› at langur leygardagur er í Havn í morgin 2.desember, ver›ur opi› hús á bilasøluni hjá Ivan Johansen, har Grand Pajero saman vi› n‡ggjasta Citroën Berlingo vi› HDI dieselmotori og dragihur›um á bá›um sí›um, ver›ur s‡ndur fram. Eisini ver›a kaffi og køkur at fáa, eins og ein hoppiborg til børnini at hugna sær vi›.

Grand Pajero fæst í tveimum støddum vi› ávikavist 3 og 5 hur›um

Mynd: Jens K. Vang

Mitsubishi Grand Pajero

v. 3 hur›um

Motorurin	4 syl. 3.2 litur DI-D 165 HK v.turbo, intercoolara og common rail
0-100 km/t	11,5 sek
Oljun‡tsla	0,3 km/l
Dekkstødd	265/70-16
Stødd og vekt	
Longd	428,0 cm
Breidd	187,5 cm
Hædd	184,5 cm
Eginvekt	1950 kg
Totalvekt	2500 kg
Prísur	kr. 296.000,- (sum vørubilur) v/ MVG + kr. 13.000,- fyri INVECS ll automatgear
Søluumbo›	Ivan Johansen Bilar Sp/f Hoyvíksvegur 63 FO-110 Tórshavn Tlf. 313666